

*Sjálvt um talan er um stórfingna bygging, eru hvørki Múrurin í Kirkjubø, Christianskirkjan í Klaksvík og Norðurlandahúsið í Havn nøkur undurverk, heldur Albert Isfeld, arkitektur*
*Savsmyndir*

# Langt til undurverk

**Ein arkitektur heldur tað vera fínt at fáa eitt orðaskifti um bygging í Føroyum, men staðfestir, at onki bygningsverk livir upp til eitt undurverk. Orsøkin er, at føroyskir politikarar ongantíð hava havt nakrar ambitiónir um at skapa stórverk í føroyskari bygging. Og tað hevur ongantíð verið verri enn júst nú**

BYGGING
*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*



*Albert Isfeld, arkitektur, heldur lítið um føroysku politikararnar, tá tað snýr seg um bygging. Har eru rætt og slætt ongar ambitiónir*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Kendi føroyski arktitekturin, Albert Isfeld, heldur tað vera fínt, at Kringvarpið skipar fyri eini kapping um tey bestu føroysku bygningsverkini, tí hetta kann um ikki annað skapa eitt orðaskifti um spurningin. Trupulleikin er bert, at vit ikki hava nakað bygningsverk í Føroyum, sum livir upp til heitið »undurverk«. Tíansheldur koma upp á heili sjey av slagnum, heldur hann.

- Hvørki landspolitikarar ella lokalpolitikarar tykjast hava nakran sum helst áhuga fyri at skapa nakað, sum líkist nøkrum undurverki. Og tað hevur ongantíð verið verri enn júst nú, sigur Albert Isfeld.

Her vísir hann á løgtingshúsið sum dømi, har politikararnir høvdu møguleika fyri at leggja støðið undir eitt flott bygningsverk. Ístaðin valdu teir at varðveita eitt »høsnarhús«, sum hann kallar verandi løgtingshús, ið ger, at alt kompleksið líkist eini lappaloysn. Albert Isfeld undirstrikar, at onki er galið við tí arbeiðnum, sum arkitekturin aftan fyri løgtingshúsið hevur gjørt, men at rammurnar ikki vóru til staðar fyri at fáa nakað líkinda burturúr.

At vit ikki hava ráð at gera íløgur í vala bygningar, gevur Albert Isfeld heldur ikki nógv fyri.

- Við einum fingraknipsi byggja tunlar fyri eina hálva milliard og meiri, sum liggja undir jørð, so hatta við at vit ikki hava ráð, er nakað tvætl. Samfelagið hevur ongantíð verið ríkari enn nú, men hoyrir tú nakran politikara tosa um at byggja okkurt, sum bæði vit og eftirtíðin fær gleði av? Nei, hvørki í løgtinginum ella í býráðnum í Havn, har pengarnir eru, eru ambitiónir um nakað sum helst, staðfestir Albert Isfeld.

### Trý verk í nánd

Tá Sosialurin spyr bersøgna arkitektin, hvat kemur nærmast einum føroyskum undurverki skapt av mannahondum, nevnir hann trý. Tey eru Kirkjubømúrurin, Norðurlandshúsið og Christianskirkjan.

- Nú eru ymsar meiningar um, hvørt Kirkjubømúrurin nakrantíð gjørdist liðugur, men familjan ígjøgnum 17 ættarlið hevur funnið sluttsteinin, so nógv týðir uppá, at so var. Í øllum førum varð lagt støðið undir at gera nakað stórt har við gotiska byggistílinum. Og sjálvt um Norðurlandahúsið og Christianskirkjan eru valaverk, so haldi eg ikki, vit kunnu siga, at hesi liva upp til heitið undurverk, sigur Albert Isfeld.

Hann er væl greiður yvir, at vit eiga at síggja kappingina út frá einum føroyskum mátistokki, men sjálvt út frá tí ber ikki til at finna nakað, ið livir upp til hetta.

- Sjálvandi høvdu vit ongantíð kunnað brúkt egyptisku pyramidurnar sum mátistokk, men kortini haldi eg ikki, at vit á nakran hátt liva upp til tað, vit kundu megna, um viljin var til staðar. Ístaðin byggja vit eitt høsnarhús fyri og annað eftir, sigur Albert Isfeld.

- Vit hava pengarnar nú og áttu tí at brúk teir til at skapa varandi virði.

## 116 uppskot til undurverk

- Altartalvan í Vestmanna Kirkju
- Amtmannsborgin í Havn
- Antennan á Loranstøðini á Eiði
- Apotekið úti í Klaksvík
- Bátahylurin í Húsavík
- Bólið hjá teimum Sunnaru í Sandavági
- Brimgarðurin á Fiskaeiðinum í Hvalba
- Brúgvin um Glyvragjógv
- Brúgvin um Sandá í Havn
- Brúgvin um Sundsvegin í Havn
- Brúgvin út í Mikineshólm
- Bukkarnir, sum hildu rennistrongin úr Rangabotni og oman á Drelnes
- Býlingurin Heimi í Húsi í Koltri
- Byrging í Heygadali
- Christianskirkjan
- Diana Victoria (báturin hjá Ova Joensen) í Nólsoy
- Dómkirkjan
- Ebenezer í Havn
- Frammi við Gjónna við Leynavatn
- Fríðrikskirkjan á Toftum
- Føroya Tele bygningur
- Gamla Landsbókasavnið
- Gamla Rætt
- Gamli býlingurin í Norðagøtu
- Gamli einahandilin úti í Klaksvík
- Gamli Kommunuskúlin í Havn
- Grótgarðarnir í Gásadali
- Gróthústangi í Vágum
- Grótlagingin í Hesi
- Grundin á Roykstovuni í Klaksvík
- Gøtan í Mykinieshólm
- Havið við Norðurlandahúsið
- Heiðursportrið í Nólsoy
- Hillabøurin í Vík
- Hvalaportur í Sigmundargøtu í Havn
- Hvalbiar tunnilin
- Í Hoygarðum í Leynum
- Kálvalíð í Miðvági
- Keldan í Skálabotni
- Kgl. handilinT.F. Thomsen og fiskaplássið
- Kioskin á Vaglinum í Havn
- Kirkjan á Eiði
- Kirkjan á Sandi
- Kirkjan í Gøtu
- Kirkjan í Saksun
- Kirkjan í Vík
- Kirkjubøar Kirkja
- Kirkjubømúrurin
- Kirkjubøstólarnir
- Kollafjarða Kirkja
- Kongavarðarnir á Kirkjubøreyni
- Látralonin á Eiði
- Listasavn Føroya
- Listasavnið á Sandi
- Mariukirkjan í Havn
- Mentanarhúsið í Fuglafirði
- Merkið í Fámijins Kirkju
- Mikkjal á Ryggi risti ørindi í hendan stein í Miðvági
- Minnisvarðin á Syðradali, Kallsoy
- Minnisvarðin í Porkeri
- Minnisvarðin í Rituvík
- Minnisvarðin í Viðarlundini í Havn
- Minnisvarðin við Gjógv
- Minnisvarðin við Gjógv
- Myllan Niðri í Húsi í Hattarvík
- Müllers Pakkhús í Havn
- Nes Kirkja
- Neystini í Húsavík
- Nólsoyar Viti
- Norðoyar Sparikassi í Klaksvík
- Norðoyartunnilin
- Norðurlandahúsið
- Norrøna
- Ónagerði á Viðarreiði
- Porkeris Kirkja
- Porkeris Skúli
- Radarstøðin á Sornfelli
- Rúnasteinurin í Sandavági
- Rundkoyring og standmynd í Klaksvík
- Rætt Kálvs Lítla
- Rættin á Kirkjubøreyni
- Saltsilo á Drelnesi
- Sandavágs Kirkja
- Skansin
- Skúlaskipið Dragin
- Sluppin Johanna
- Sluppin Norðlýsið
- SMS í Havn
- Smyril
- Stabbagrótlaðing við havnalagið á Tvøroyri
- Standmyndir í Fuglafirði
- Stjørnuhúsini ovasta á Dalavegnum í Havn
- Stokkastovan
- Stórigarður kring Havnina
- Summarhús á eggini í Mikadali
- Svangaskarð
- Tarira standmyndin
- Tinganes
- Trappan inni á Christiansborg
- Trappurnar til lendinginga í Gásadali
- Trøðin hjá Arnhold West í Hvalba
- Túnið hjá Húsfrúnni í Húsavík
- Tunnilin millum Mittvatn og Ryskivatn
- Tvøroyra Kirkja
- Urtagarðurin á Langtrøðni í Miðvági
- Úti í Grøv í Klaksvík
- V. U. Hammerhaimbs-minnisvarðin í Sandavági
- Vágasnellan
- Vágatunnilin
- Vágs kirkja
- Vatnorkuverkið í Botni
- Vesturkirkjan
- Viðarlundin í Havn
- Viðarlundin í Kunoy
- Vitin á Stong í Nólsoy
- Zarepta í Vatnsoyrum

kelda: kringvarp.fo